FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi

Tórshavn – Juli 2024

# VÆLKOMIN Á DEILDINA FYRI HEILSU- OG SJÚKRARØKTARVÍSINDI (DHS) Á FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Niðanfyri er stutt kunning í sambandi við lestrarbyrjanina á DHS, eins og skráin fyri fyrstu vikuna.

Fyrsta vikan, sum er vika 34, er innleiðsla til útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing, sum fevnir um fakligt innihald, lestrarkrøv, lestrarvanar og samansjóðing, umframt atgongd til annað viðkomandi tilfar.

## Fyrstuhjálparskeið

Kravt verður, at øll, sum byrjað at lesa sjúkrarøktarfrøði, hava skeið í 1. hjálp. Skeiðið skal
ikki vera eldri enn 2 ár, tá søkt verður. Umráðandi er eisini, at skeiðið ikki er styttri enn 12
tímar. Um tú ikki hevur skeiðið, so skipar deildin fyri 1. hjálparskeiði týsdag, mikudag og hósdag í viku 33, kl. 17-21 allar dagar.

Tey, sum ynskja at taka skeiðið á deildini, verða biðin um at melda til við at senda teldupost til mariao@setur.fo í seinasta lagi týsdagin **6. august 2024**. Í teldupostinum skulu tit skriva navn og upplýsa, at tit skulu byrja á sjúkrarøktarfrøði útbúgvingini.

Skrá fyri innleiðsluna sæst niðanfyri. Sí eisini nærri skrá og tilfar í sambandi við felags innleiðsluvikuna frá Lestrarskrivstovuni.

Vælkomin til eina spennandi útbúgving á Deildini fyri Heilsu – og Sjúkrarøktarvísindi.

Vit gleða okkum at síggja teg.

Vinaliga

Eivy Kristiansen og Eina Hansen Eliasen

Toymið fyri 1. lestrarhálvu 2024 (flokkur 2024 summar).

Deildin fyri Heilsu – og Sjúkrarøktarvísindi/DHS

## Skrá fyri innleiðsluna á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| kl. 09:00 | Skráseting (lesandi fáa lestrarkort og kunningarmappu) |
| kl. 09:15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| kl. 09:25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| kl. 09:30 | Tónleikur |
| kl. 09:45 | Røða |
| kl. 10:00 – 11:00 | Básar á Svalanum |

*Lesandi fara út á deildirnar*

| | |
|---|---|
| kl. 11:00 | Magni Mohr, dekanur, bjóðar vælkomin |
| kl. 11:15 | Lesandi á sjúkrarøktarfrøði fara upp á 5. hædd í **høli 507** |
| kl 11:30 | Deildin bjóðar ábit |
| kl 12:00 | Kunning frá útbúgvingarleiðara, Sonju Nielsen |
| kl 12:30 | Starvsfólk presentera seg |
| | Dagurin endar kl 13:00 |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

| | |
|---|---|
| kl. 12:00 | Samansjóðing (høli 507) og rundvísing í Sjóvinnuhúsinum |
| kl. 13:30 | Tryggja at øll lesandi eru komin á viðkomandi telduskipanir (havi egna teldu við) |
| | Dagurin endar kl 14:15 |

**Mikudagin 21. august**

Hendan dagin møta tit kl 9:00 í høli 507 og eru saman við tykkara árgangi. Mentorar skipa fyri samansjóðandi tiltøkum, síðan verður felagsmáltíð og undirhald.

**Hósdagin 22. august**

Undirvísing ***(sí tímatalvu).*** Tit møta í høli 507.

**Fríggjadagin 23. august**

Undirvísing og felagstími fyri sjúkrarøktarfrøðilesandi í Kongshøll ***(sí tímatalvu).*** Tit møta í høli 507.

kl. 20:00-02:00 SeturSamanShow í Reinsaríinum